## Tróndardagar í Gøtu í summar

Vikuskiftið, táið G! vanliga hevur verið, men sum er avlýst í ár, verður kortini skipað fyri hátíðar- og veitsluvikuskifti í Gøtu. Á Tróndardøgunum, sum nýggja hátíðin eitur, 12. til 19 juli, verður loksins reist standmynd yvir Trónd í Gøtu, mætasta høvding føroyinga, og í eina viku verða tiltøk við tónleiki, sjónleiki, fyrilestrum, framsýningum, gongutúrum og øðrum, skrivar fyrireikararnir í tíðindaskrivi.



## Eftirlýsa upptøkur frá krígnum

Í sambandi við verkætlanina »Føroyskar Søgur«, ið Eik Banki og danska framleiðslufelagið Substanz í felag hava tikið stig til, so hevur føroyski samskiparin, Uni L. Hansen, og starvsfólk hjá Substanz leitað land og ríkið runt, fyri at finna gamlar upptøkur, ið gjørdar eru í Føroyum seinastu 100 árini. Tíðarskeiðið undir krígnum er sera soltið við upptøkum. Tí kemur ein innilig áheitan frá samskiparanum, sum hava upptøkur frá 2. heimsbardaga, um at koma við teimum.

# Fly Faroe skal draga ferðafólk

**Atlantsflog hevur boðið ferðavinnufólkum úr øllum Evropa, USA og Japan til Føroya at kunna seg um Føroyar og um føroyska ferðavinnu**

FERÐAVINNA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Skotin, Benjamin Garey, sum var ein av serfrøðingunum í "National Geografic Traveller", sum valdi Føroyar sum nummar 1 av 111 oyggjasamfeløgum í verðini, greiddi frá, hvussu tey arbeiða við at fáa vistfrøðisliga ferðavinnu upp at standa í Føroyum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Atlantic Airways er í hesum døgum – triðja árið á rað – vertur fyri stóra ferðavinnutiltakinum, tey kalla Fly Faroe. Hetta er eitt tiltak, har Atlantsflog bjóðar touroperatørum úr øllum Evropa, USA og Japan til Føroya at kunna seg um Føroyar og um føroyska ferðavinnu.

Tiltakið byrjaði í gjár og endar sunnudagin. Tað mesta av tiltakinum er á Hotel Føroyum.

- Hesaferð eru keyparar úr USA, Japan, Ruslandi, Letlandi, Slovakia, Týsklandi, Hollandi, Belgia, Onglandi, Skotlandi, Danmark, Noregi, Svøríki, og Íslandi íalt 43 fólk. Harafturat hava vit fingið hópin av útlenskari pressu á vitjan eisini, hóast ikki øll luttaka alla tíðina á FlyFaroe, men heldur ferðast eitt sindur runt fyri at síggja oyggjarnar. Vit hava pressufólk úr Svøríki, Onglandi, Skotlandi og Danmark, sigur Maria á Lofti, marknaðarsamskipari hjá Atlantsflog.

Tiltakið byrjaði við einum "Get together kvøldið" í Listaskálanum í gjárkvøldi fyri at samansjóða luttakararnar. Tann stóri dagurin er í dag við nógvum áhugaverdum fyrilestrum.

Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna í vinnumálum setti stevnuna í morgun. Skotin, Benjamin Garey, sum var ein av serfrøðingunum í "National Geografic Traveller", sum valdi Føroyar sum nummar 1 av 111 oyggjasamfeløgum í verðini, og greiddi hann eitt nú frá, hvussu tey arbeiða við at fáa vistfrøðisliga ferðavinnu upp at standa í Føroyum.

Íslandsføroyingurin, David Samuelsson, greiddi frá, hvat hann leggur dent á at nevna og vitja, tá ið hann fyriskipar bólkaferðir úr Íslandi til Føroya og seinni í dag fer rithøvundurin og myndamaðurin innan surfing, Yassine Ouhilal, at hava eina framløgu um surfing í Føroyum og kanska eisini á Lofoten, har hann arbeiðir í løtuni viða t gera upptøkur til EuroSport um surfing. Hann var í Føroyum herfyri saman við kendum surfarum og gjørdi royndir við at surfa her.



*Magni Arge, stjóri í Atlantsflog*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Seinnipartin í dag verða work-shop á skránni, har keypararnir kunnu gera avtalur face-to-face við føroysku veitararnar.

Dagurin endar við einum hugnakvøldi í Sjónleikarhúsinum fyri luttakarunum og innbodnum gestum.

- Í morgin, leygardagin, fara allir gestirnir á útferð. Tey hava fingið møguleikan at velja millum fýra útferðir, Nólsoy Kirkjubø/Koltur um viðrar annars Gjáar, koyra í fýra-hjóls traktorum í fjøllunum við Vestmanna ella við Lakeside til Bøsdalafoss, har tey sum tora kunnu „rapella“ niður eftir fossinum, sigur Maria á Lofti.



*Nógv føroysk ferðavinnufólk eru eisini á ráðstevnuni hjá Atlantsflog, har 43 útlendsk ferðavinnufólk eisini luttaka – alt til tess at fáa fleiri ferðafólk hendanvegin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*